# Potter umseting ávegis

**Tað stendur á við at fáa nýggjastu Harry Potter bókina týdda til jóla**

ÚTGÀVA
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*



Tá Kári Árting lat bókasøluna í SMS upp leygarmorgunin stóðu fólk og bíðaðu uttanfyri.

Og tað var ikki hissini bók, kundarnir vildu hava. Á hillunum lá sjálv sætta og næstsíðsta bókin í røðini um Harry Potter. Harry Potter and the Half Blood Prince eitur bókin. Sjálvur slap hann heldur ikki at lesa bókina fyrr enn leygardagin. Harðar treytir vórðu settar frá forlagnum í Onglandi um, nær bókin kundi latast upp og hvar.



*Bergur Rasmussen*

### Stríðist við at týða

Eins og øll onnur mátti Bergur Rasmussen bíða til leygardagin, áðrenn hann kundi seta seg at lesa Harry Potter and the Half Blood Prince.

Tað serliga við Bergi er, at hann skal týða bókina til føroyskt. Og bókin skal helst verða klár til jólasøluna.

– Hesaferð er bókin útkomin tríggjar vikur seinni enn seinast, men eg fari at royna at fáa hana liðugt umsetta til jóla, sigur Bergur Rasmussen.

Tá vit høvdu hann í telefonini leygardagin, hevði hann ikki lisið meira enn tíggju síður. Men tað plagar at ganga skjótt hjá teimum, ið dáma Harry Potter bøkur.

Hetta er aðru ferð, at Bergur Rasmussen skal umseta Harry Potter. Gunnar Hoydal og Malan Háberg hava áður týtt Harry Potter bøkur til føroyskt.

14. oktober verður Harry Potter and the Half Blood Prince útgivin á donskum.

# Mentir leiðarar

Leiðaraskúli við norðurlendskum luttakarum var við Gjógv í farnu viku. Tað er Føroya Ungdómsráð, sum saman við Samorganisation for Ungdomsarbejde, stytt NSU, hevur skipað fyri tiltakinum, ið er fyri ungdómsleiðarar í Norðurlondum. Jákup av Skarði frá Føroya Ungdómsráð sigur, at leiðaraskúlin hevur ment tey fólkini, sum arbeiða innan tað skipaða ungdómsarbeiði á okkara leiðum. Aðalendamálið við tiltakinum var at stimbra og menna ungdómsleiðarar. Jákup av Skarði sigur, at hann er væl nøgdur við úrslitið.

– Vit hava koyrt eina leypandi eftirmeting, og tað hevur verið øgiliga positivt; sjálvt niður til minstu detalju við gisting og mati. So eg má siga, at leiðaraskúlin hevur verið øgiliga væl eydnaður, sigur Jákup av Skarði.



*Einir tretivu luttakarar vóru á leiðaraskeiði við Gjógv. Her er norðurlendski ungdómurin avmyndaður uttanfyri Norðurlandahúsið, har seinasta máltíðin var, áðrenn tey fóru hvør sín veg*

*Mynd: Bárður*

Leiðaraskeiðið hevur verið merkt av fyrilestrum, bólkaarbeiði, og kjaki. Jákup av Skarði sigur, at tíðin má vísa, hvat fer at liggja eftir.

– Kanska kann okkurt av hesum brúkast í framtíðini, tá leiðaraskúli aftur verður á skránni, sigur Jákup av Skarði.

# Koyrdi 130 í kollfjarðatunlinum

Løgreglan tók kl. 02.30 sunnumorgunin ein mann fyri at koyra 130 í kollfjarðatunnilinum á veg til Havnar. Hann kann vænta sær at missa koyrikortið.

Ein annar maður koyrdi ikki so øgiliga skjótt, tá hann varð steðgaður av løgregluni. Hansara trupulleiki var, at hann var skítfullur. Biltúrurin um fýra tíðina í leygarnáttina verður væntandi tann seinasti í longri tíð hjá manninum.

Annars varð eitt sindur av herverki gjørt í høvuðsstaðnum í nátt. Fólk hava gjørt seg inn á ein hýruvogn, eitt vindeyga og eini hús í Hoyvík hava heldur ikki fingið frið.

Annars er einki, sum fjølmiðlarnir hava áhuga fyri, at frætta, sigur vakthavandi á Politistøðini í Havn.

**-HR**

# Friðarlig stevna

Tað oysti niður í Vágum í leygarnáttina, men tað dryppaði ikki á virksemið hjá løgregluni í Vágum. Stevna var hildin, men so at siga einki kriminelt - sæð frá einum løgreglusjónarmiði - gekk fyri seg.

Virkandi sýslumaðurin sigur, at tað var stak, stak friðarligt. Einki av nøkrum slag.

Einasti tilburðurin var eitt lítið innbrot. Ein drongur, sum var á vitjan í oynni, breyt inn í kjallaran hjá einum handli og ognaði sær 300 krónur. Gleðin var tó stokkut, tí fólk hava borið eyga við hann, og løgreglan hevur fingið fatur á honum, og hann hevur viðgingið sínar syndir.

Hann kann vænta sær at koma fyri ein dómara í næstum.

**-HR**